## DAGSINS MEINING

# Tórsgøta er vorðin mentanarmiðdepil

Tá Asfalt í kvøld fer av bakkastokki er talan um ivaleyst størsta tónleikatiltakið í Føroyum nakrantíð.

Frá tá Asfalt byrjar í kvøld kl. 19 og endar á miðnátt leygarkvøldið, hava ikki færri enn 60 bólkar, kór og einstaklingar framført eini 30-40 tímar av livandi tónleiki í Tórsgøtu, og alt verður framført av føroyskum bólkum.

Fyrireikararnir av Asfalt, høvdu ein dreym, ið nógv mettu vera utopiskan, “at savna SO nógvar føroyskar bólkar til eitt tónleikatiltak í sjálvum hjartanum av høvuðsstaðnum.” Ein kendur festivalfyriskipari í Føroyum segði um tiltakið, at hann ikki metti, at hetta kundi nýtast sum sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik, tí um tú savnar so nógvar føroyskar bólkar, so verður tú noyddur at fara á kompromis við góðskuni.

Men nú fýra mánaðir eftir, at ætlanin varð avdúkað, sæst úrslitið, og úrslitið er stórsligið. Nøvnini eru fjølbroytt, og góðskan er høg. Tiltakið vísir í størri mun enn nakað annað tiltak, hvussu ríkt føroyska tónleikalívið er. Hetta er uttan iva best egnaði sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik nakrantíð.

Tá vit fluttu í Miðlahúsið í Vágsbotni í fjør, høvdu vit frá fyrsta degi ætlanir um at verða ein virkin partur av mentanarlívinum í Tórsgøtu. Tað eru longu fleiri ár síðan, at Tórshavnar kommuna vísti á sínar ætlanir um, at Tórsgøta skuldi vera mentunargøtan í Havn. Við Tjóðpalli og ungdómshúsi er gøtan longu væl ávegis. Nú er livandi tónleikur eisini farin at ljóða í grannahúsunum og hjá Tjóðpallinum, og tað er at gleðast um.

Við teimum nógvu og fjølbroyttu tiltøkum, tað verið seg fyrilestrar, tónleikur, framsýningar, kjakfundir og alt hitt, ið vit hava í Miðlahúsinum eru vit eisini við til at stuðla undir hesar ætlanir. Og tað gera vit fegin og er tað eisini ein náttúrligur partur av okkara miðlahúskonsepti, eitt konsept, sum skal vera livandi og hava møguleika at útvikla seg.

Tað var tí heldur ongantíð nakað ivamál um, at vit skuldu vera partur av Asfalt. Við Asfalt verður Tórsgøta mentanargøtan, og Miðlahúsið í Vágsbotni er erri av at vera partur av hesum.

**Sosialurin**

# Hví trívist lærarin ikki???

HANNA LISBERG



**Í øllum framkomnum londum gera tey eina eftirmeting, tá ein nýggj skipan er roynd á økinum í eina tíð. (Eftir áheitan endurprenta vit hesa greinina, sum stóð í Sosialinum 21. november í 2001**

Um tað mundi, tá Føroya Spesialskúli var komin, t. v. s. fyrst í sekstiárunum, var nógv frammi um integrering. Eisini í Føroyum vóru bylgjurnar høgar viðhvørt, og tað vóru tey, sum ynsktu henda skúlan, (spesialskúlan) har piparið vaks.

Hvat hevði fólkaskúlin at bjóða, áðrenn spesialskúlin kom?

Einki! Tað var ikki eftir áheitan frá skúlunum, men frá fortvivlaðum foreldrum, sum høvdu sent síni børn av landinum.

Eingin - eg taki uppaftur - eingin kann hugsa sær, hvussu hesi foreldur høvdu kempað og stríðst millum at hava børnini heima við ongari frálæru, og so at lata tey fara av landinum og fáa frálæru.

Væl vitandi nú, so síggi eg, at áhaldandi bøn og úthaldni fekk tey at taka hesa avgerð. Ærað veri teirra minni.

Hjúnini Annilena og Jákup Zachariasen slóðaðu fyri einstaklingar? og serundirvísingini í Føroyum.

Vit vóru nøkur, sum valdu at fara undir hetta krevjandi arbeiði.

Tá eg upplivdi hesi 3: Ditlev, Margit og Hjørmund - hvussu stórt arbeiði, og hvussu stóran kærleika, tey løgdu í frálæringina, so ivaðist eg onga løtu í, hvørjum børnum eg ynskti at undirvísa.

Vit vóru ofta send niður á skúlar, tí tú mátti endurnýggja teg alla tíðina, tí tað hendir so nógv á hesum øki. Niðri var baklandið størri, og tí var tann vegurin valdur.

Meðan eg var á deyvaskúlanum á Kastelsvegnum, kom út ein bók ? eftirmeting viðv. integreringini. (1965).

Longu tá gjørdu tey vart við, at ikki var alt so gott, sum tey høvdu vónað. (Her er talan um øll brek). Ein av orsøkunum var, at lærarar vóru farnir at skifta starv, tí hetta fór at verða ov lítið úrslit í mun til tað arbeiðið, ið lagt varð í.

Her skal leggjast aftrat, at eingin sparing var upp á tal, og nógvir lærarar høvdu fingið ta kravdu frálæruna at taka sær av hesum.

Nakrir lærarar høvdu fingið eina eyka útbúgving, men eg veit t.d. at einasti skúli, ið t. d. undirvísti deyvum og blindum, var spesialskúlin, men har komu tey ikki í praktikk?

Annars hevur fólkaskúlin als ikki fingið fyrireikað seg at taka ímóti næmingum við serligum tørvi.

Hesir skúlar høvdu kortini gjørt eitt dygdargott fyrireikingararbeiði ? at taka ímóti deyvum. Eg hugsi, at teir skúlastjórarnir hava trýst nógv á og sett treytir og fingið sín vilja.

T. d. sendu hesir báðir skúlar lærarafólk til Havnar - fyrst eitt heilt ár og seinni á stytri skeið og hetta vóru sera dugnalig og virkin fólk, sum valdu sær hetta. Skúlin í Rituvík hevur víst, at tað bar til, og úrslitið kunnu tey vera stolt av. Allur flokkurin (úr 1. flokki og allan vegin upp) lærdi t.d. teknmál, so næmingurin, sum deyvur var, hevði bæði familju og lærarar og floksfelagar, sum hann lættliga kundi samskifta við.

Ferð eftir ferð havi eg víst á, at »integreringin« hevur gjørt lærarar til syndabukkar. Hví? Jú, henda uppgávan er smoygd niður yvir tey ? uppgávan, sum er so stór, men sum endar við, at fleiri lærarar ganga við ringari samvitsku, tí so lítið kom burturúr. Vit eiga nógv fram úr dugnalig lærarafólk, og tað er spell, at tey lítið annað vita sær, enn at skifta starv. Eg eri bangin fyri, at nú vendist ikki við, tí nú er einki stað at senda tey við serligum tørvi. Spesialskúlan hava tey brotið niður. Nokk so vanligt fyribrygdi í Føroyum: Tað, sum virkar væl, skal niðurbrótast.

Samanber við Landssjúkrahúsið o. m. a.

Til lærarafelagið vil eg siga: Haldið fram við tykkara ágrýtni fyri einum góðum fólkaskúla ? hann er grundvøllurin í tí føroyska samfelagnum.

Eg ynski tykkum alt tað besta.

Eitt má samfelagið syrgja fyri og tað er, at vit ikki koma í ta støðu, sum vit vóru í, áðrenn 1962, tá børn vórðu send av landinum at fáa frálæru.

Børn hava rætt til góðan SKÚLA í heimlandinum.

# Fólkaskúlin

FRITS JOHANNESEN



Hoyri í løtuni at kunningartøknin verður umrødd í miðlunum og víst verður á tørvin á hesum. Teldan er eitt hent amboð, sum stórur partur av Føroya fólki nýtir dagliga. Skúlarnir undirvísa í teld og hava flestu skúlar innrættað seg soleiðis, at møguleiki er fyri at kunna næmingar um hetta henta amboð. Bara vísa á t. d. hevur tú eina kanón í stovuni, sum stendur í samband við eina teldu og alnótina, er markleysur møguleiki at geva fjølbroytta undirvísing t. d. í myndlist - finna evnið til undirvísingina og vísa á ymsar greinir í listini. Her er einki mark. Hugsandi er, at eingin skúli í Føroyum, sum er burtur av ein kt-skúli, men kanska er tað rætt, at vit ikki leypa framav, men ganga stigvíst fram og fáa eina góða loysn til endans øllum at gagni

Tú kanst, sum er, sita heima og undirvísa næmingunum, men kravið er, at allir næmingarnir hava samband við alnótina. Hetta er ein sera spennandi undirvísing, og hevði eg hildið, at royndir vórðu gjørdar hesum viðvíkjandi. Haldi ikki, vit skulu vera bangin fyri at brúka eitt amboð, sum næmingarnir kenna væl betur til enn flestu lærarar.

Hví ikki taka ein 8. flokk á onkrum skúla sum eina roynd? Hetta er ein avbjóðing, og eg ivist onga løtu í, at tað ikki fer at spyrjast gott úrslit burtur úr hesum. Eftir hetta bygt ein kt-skúla, har øll undirvísingin fyrifórt á teldum og øllum tí, sum er knýtt at hesum.. Hví ikki tað? Hetta er visiónin í hesum árhundrað.

Tær skapandi lærugreinirnar skuldu havt gott pláss innan hesar veggir. Vit hava eina musikskúlalóg, eina frítíðarlóg og eina fólkaskúlalóg. Hví ikki taka tað besta burturúr hesum lógum, og sett tær saman? Eingin kann nokta tær, at gera hetta í morgin. (Hevði hildið, sum støðan er í løtuni, at fólkaskúlin og musikskúlin var ein skúli). Vit eru alt ov bangin fyri at flyta okkum - bangin fyri tí tóma rúminum. Teldan, alnótin, breiðbandi o.s.fr. hava givið okkum eina rúmd afturat, sum er so sera spennandi, at ikki sigst frá hesum. Vit eiga at fara meira inn í hesa telduverð, oyst úr hesari flotkeldu nógv meira enn vit gera.

GG! Eysturoyingar eiga at fara undir eina fyrireiking til ein kt-skúla, og hann kundi t. d. ligið í Skálabotni.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.